# Royna at lokka læknar til Føroyar

*Teir føroysku hjálparlæknarnir fingu ikki so stóra lønarhækking, sum teir høvdu ætlað sær. Men teir eru kortini vælnøgdir við nýggja sáttmálan*



*– Vit fingu ikki so stóra lønarhækking, sum vit ætlaðu. Men vit fingu nógv annað við í nýggja sáttmálan sum ger, at vit hampiliga væl nøgd kortini, sigur Jens Andreassen, formaður í føroyska felagnum fyri yngri læknar*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Hetta var seinasti møguleikin. Og tíbetur gekk tað so at vit sluppu undan at seta tiltøk í verk.

Jens Andreassen, formaður í føroyska felagnum fyri hjálparlæknar, FAYL, sum stendur fyri Foreningen Af Yngre Læger, er fegin um, at tað loksins eydnaðist at fáa sáttmála í lag við Fíggjarmálastýrið hjá Landsstýrinum.

Sáttmálin hjá hjálparlæknunum gekk út 31. mai í fjør og líka síðani hava teir sáráðst við fíggjarmálastýrið við jøvnum millumbili, men heilt leingi sá svart út.

Men í hesum umfarinum loysnaði knúturin so, og seinnapartin fríggjadagin skrivaðu partarnir undir nýggjan sáttmála.

Jens Andreassen sigur, at hetta var seinasti møguleikin at fáa ein sáttmála í lag.

– Samráðingarnar hava nú vart so leingi, at vit høvdu sett okkum fyri, at fingu vit ikki sáttmála í hesum umfarinum, høvdu vit givist og vóru farnir at seta tiltøk í verk, sigur formaðurin í Føroya deildini hjá FAYL.

**Lokka læknar til Føroya**

Jens Andreassen sigur, at tað, sum teir løgdu stóran dent á, var at fáa ein sáttmála, sum kundi eggja læknum til at koma til Føroyar at arbeiða.

– Tað er stórt læknatrot í Føroyum og tað gongur ógvuliga strilti at fáa læknar hendavegin, tí umstøðurnar eru so nógv betri aðrastaðni.

Eitt nú eru lønin í Danmark eini 15%, hægri í Danmark enn í Føroyum, og í vissum førum er munurin enntá enn størri. Og harafturat hava læknarnir í Danmark nógv betri sømdir enn starvsfelagir í Føroyum, í sambandi við barnaansing, bústaði o.s.fr.

Tí settu hjálparlæknarnir nógv uppá at fáa eina trivaliga lønarhæking hesuferð fyri at útjavna munin ímillum lønirnar í Danmark og í Føroyum, so at tað ikki skuldi vera ein forðing fyri at átaka sær starv í Føroyum.

**Fingu ikki lønina**

Men tað eydnaðist ikki hjálparlæknunum, at fáa ta lønarhækkingina, sum teir høvdu ætlað, tí landsstýrið vildi ikki víkja frá lønarhækkingini sum hini fakfeløgini hava fingið.

Men læknarnir fingu so ein trý ára sáttmála við eini samlaðari lønarhækking uppá 9,2%, omaná lønina sum var galdandi í 1998.

Sjálv grundlønin 10% frá støðinum 1. januar 1999.

Fyrst hækkar hon 3,5% við afturvirkandi kraft frá 1. juni 1999. Síðani hækkar hon 1,5% við afturvirkandi kraft frá 1. januar í ár. Síðani hækkar hon aftur 2,5% 1. juni og at enda hækkar hon 2,5% 1. juni næsta ár.

Restin av lønarhækkingini verður løgd omaná yvirtíðina og ymsar viðbøtur, sum læknarnir hava.

**Fingu fleiri ábøtur**

Tó fingu læknarnir fleiri aðrar ábøtur í sáttmálan, sum teir vóna kunnu verða ein gularót hjá læknum, táið teir skulu velja sær starvsstað.

Eitt nú skal ein arbeiðsbólkur við tveimum umboðum fyri Almanna-og heilsumálastýrið og tveimum umboðum fyri hjálparlæknarnar, setast at arbeiða við tiltøkum sum kunnu lokka fleiri læknar til Føroya.

Eitt nú skal bólkurin kanna møguleikarnar fyri barnaansing á Landssjúkrahúsinum, men hetta krevur tó góðkenning frá kommununi.

Samstundis skal bólkurin arbeiða fyri at geva læknunum umstøður at granska.

Men harafturat skal bólkurin arbeiða fyri at fáa avtalu í lag við Ríkissjúkrahúsi og Hovedstadens Sygehusfællesskab um, at „turnusstørv“ og „introduktiónsstørv“ í Føroyum skulu geva rætt til undirvísingarstarv.

Hetta heldur Jens Andreasen, er eitt stórt framstig.

„Turnusstarvið“, sum er 18 mánaðir, er tað fyrsta starvið hjá einum lækna eftir lidnan lestur.

Men serliga í Keypmanna havnarøkinum er tað kanska eitt ár at bíða eftir einum „turnusstarvi“.

Aftaná tað, fer læknin í eitt „introduktiónsstarv“, sum er fyrireikingin til tað greinina, sum læknin ætlar at serútbúgva seg í.

Landssjúkrahúsið kann bjóða „introduktiónsstørv“ í heilivági, skurðfrøði, ortopedi, kvinnusjúkum og sálarfrøði.

Triðja starvstigið hjá læknanum er undirvísingarstarvið, sum er tann størsti fløskuhálsurin í allari útbúgvingini til serlækna og tað kann bara takast uttanlands.

–Men fáa vit avtalu um, at „turnusstarv“ og „introduktiónsstarv“ í Føroyum skal geva rætt til undirvísingarstarv, halda vit, at tað er ein ógvuliga stórur fyrimunur.

– Tí, ger eitt starv í Føroyum, at tað verður lættari at fáa undirvísingarstarv, vóna vit, at tað fer at lokka yngri læknar higar.

„Turnusstarv“ og „introduktiónstarv“ hjá einum lækna taka 3 - 3 1/2 ár, og kunnu vit lokka yngri læknar til Føroyar hesa tíðina, er heilt nógv vunnið, tí tað er akkurát tað, vit hava sóknast eftir, sigur Jens Andreassen.

Men skuldi tað kortini knípt at fingið fleiri læknar hendavegin, gevur sáttmálin almanna- og heilsumálastýrinum rætt til at geva læknunum eitt serligt lønarískoyti.

Formaðurin hjá yngru læknunum sigur, at sáttmálin gevur eisini læknunum rætt til fleiri skeið, enn teir higartil hava havt og tað skuldi eisini eggja læknum at komið til Føroyar, tí tað er ofta trupult hjá læknum at sleppa á skeið.

**Ein millión um árið**

Tummas Magnussen á lønardeildini hjá fíggjarmálastýrinum upplýsir, at tá ið allar lønarhækkingarnar í nýggja sáttmálanum, eru settar í verk, kosta tær um eina millión um árið.

Men tað veldst eisini nógv um, hvussu nógvir lækanr verða, tí í løtuni eru nógv størv ósett.

Harafturat kemur so tað, sum tað betraða skeiðtilboðið, og annað kostar, men tað er ógjørligt at meta um nú, sigur hann.

# Landssjúkrahúsið skal hava sín egna barnagarð og vøggustovu

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað er frálíkt, at eisini arbeiðsplássini sjálvi eru farin at hugsa um at bøta um trupulleikan við barnaansingini.

Elin Lindenskov, formaður í Sosialu nevnd hjá Tórshavnar Býráð, tekur fult undir við tí brotinum í sáttmálanum ímillum hjálparlæknafelagið og fíggjarmálastýrið um at kanna møguleikarnar fyri at skipa barnaansing á Landssjúkrahúsinum.

Í sáttmálanum, sum varð undirskrivaður fríggjadagin, eru partarnir samdir um at seta ein arbeiðsbólk, sum m.a. skal kanna møguleikarnar fyri barnaansing á Landssjúkrahúsinum.

Partarnir eru tó samstundis greiðir yvir, at hetta krevur góðkenning frá kommununi.

Men sambært formanninum í Sosialu nevnd, fer tað helst ikki at standa á, at fáa kommununa at taka lut í eini slíkari ætlan.

Í hvussu so er heldur Elin Lindenskov sjálv, at hugskotið er frálíkt og hon ivast ikki í, at býráðið annars eisini heldur, at hetta er eitt mál, sum tað er rætt at taka undir við.

–At Landssjúkrahúsið sjálvt ger ein ansingarstovn er eitt mál, sum eg sjálv havi sóknast eftir, heldur enn bara at krevja ansingarpláss í teirri kommunalu skipanini.

Hon sigur, at starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum er í eini serligari støðu, tí tey arbeiða í vaktum alt samdøgurið.

Og barnaansing kann verða ein rættiliga stórur trupulleiki, har ið bæði foreldrini arbeiða í vaktum, ella har t.d. annað foreldrið arbeiðir í vaktum og hitt foreldrið er burtur, kanska er sjómaður o.s.fr.

Elin Lindenskov sigur, at tí eigur at miðjast ímóti at ein slíkur barnagarður eisini er opin aftaná vanliga arbeiðstíð.

Hon sigur, at møguliga kann tað eisini umhugsast at samskipa ein barnagarð til landssjúkrahúsið við ein barnagarð til Fiskavirking og onnur arbeiðspláss har í grannalagnum.

*Nú er hetta eitt serligt tiltak. Hvussu skal so hetta fíggjast?*

– Tað kann gerast uppá fleiri mátar. Men í løtuni kundi eg sjálv hugsa mær eina loysn, har Landssjúkrahúsið og møgulig onnur arbeiðspláss, sjálvi stóðu fyri byggingini, men at kommunan so kom at standa fyri rakstrinum.

*Hetta kjakið hevur verið frammi fyrr. Og tá vóru tað summi sum hildu, at hetta var at gera einum bólki í samfelagnum framíhjárættindi til eina týdningarmikla tænastu, sum barnaansing jú er?*

– Onnur arbeiðspláss hava eisini møguleikan at gera tað sama. Og tað hava tey altíð havt, men tey hava ongantíð gjørt nakað við tað.

–Hetta er ein líka stórur trupulleiki hjá arbeiðsgevarum, sum hjá arbeiðstakarum. Tað eru líka nógv teir, sum hava brúk fyri ansingarplássi sum arbeiðsfólk hava. So eg haldi ikki, at tað gjørdi nakað, um teir tóku lut í arbeiðnum at loysa hendan trupulleikan, við t.d. at fíggja barnaansing, møguliga saman við kommununi.

– Og vit skulu eisini minnast til, at fær Landssjúkrahúsið, og kanska onnur arbeiðspláss, sína egnu barnaansing, gevur tað rúmd fyri øðrum børnum í kommunalu skipanini, sigur Elin Lindenskov.



# Oljuhavn á Viðarnesi

*Dúgliga hevur verið arbeitt á nýggja havnarøkinum á Viðarnesi. Tórhavnar Havn er nú djúpast við nýggju bryggjuna*

DAGFINN OLSEN

Ikki sørt, at summi havnarfólk undraðust mánadagin. Tá lá Norrøna við bryggju á Viðarnesi, ið annars ikki júst hevur verið tilhaldsstað hjá størri skipum.

Men nú er vent í holuni.

Á Viðarnesi hevur dúgliga verið arbeitt og av Havnarskrivstovuni frættist, at djúpasta stað inni í Tórshavnar Havn er nú við bryggjuna á Viðarnesi - 9,3 metrar.

Til sammetingar kann nevnast, at djúpasta stað við molan er 8, 8 metrar djúpt.

**Oljuhavn**

At Norrøna lá við nýggju bryggjuna á Viðarnesi var bert ein roynd. Mett var, at hóskandi var at royna nýggju bryggjuna í góðveðrinum mánadagin. Ymiskt viðlíkahaldsarbeiði fór so fram, meðan Norrøna lá har.

Nýggja bryggjan er ætlað til oljuhavn. Frammanundan standa oljutangar har. Av Havnarskrivstovuni siga tey, at oljubátar stinga ofta djúpt.

**Nógv virksemi**

Annars er nógv virksemi í Tórshavnar Havn og ymisar útbyggingar fara fram, eins og víðkan av bryggjuøkinum.



*Bryggjan á Viðarnesi í Havn. Her er nú djúpasta øki í Tórshavnar Havn og er hetta ætlað til oljuhavn Mynd: Álvur Haraldsen*

# Súlan kemur á pálsmessu

*Sagt verður, at súlan kemur í Mykineshólm á pálsmessu. Pálsmessa var í gjár, men í Mykinesi høvdu tey onga súlu sæð á middegi í gjár*

DAGFINN OLSEN

Gamalt er, at súlan kemur á pálsmessu.

Pálsmessa var í gjár, men tá vit ringdu til Mykinesar í gjár og prátaðu við Katrinu Johannesen, høvdu tey onga súlu sæð. Tey ætlaðu tó at fara ein túr seinni at hyggja, tí tað eru tey von at gera.

Annars hevur veðrið nógv at siga, um súlan kemur áðrenn ella aftan á tann 25. januar.



*Súlan kemur á pálsmessu. Í middegi í gjár høvdu tey tó onga sæð í Mykinesi* **Savnsmynd**

**Ofta nógvir mans**

Farið verður eftir súlu í september.

Ofta hevur verið kjakast um eigaraviðurskiftini í Mykinesi. Ført hevur verið fram, at fólk eiga jørð, sum ikki búgva í oynni.

Í Mykinesi siga tey, at 24 mans verða bidnir eftir jørðini, sum teir eiga. Men ofta eru fleiri við. Kanska eini 40, og teir fáa vanliga eisini part.

*Fróðskaparrit:*

## Drúgv grein um William

Fróðskaparrit er komið og er hetta 47. bók. M.a. verður William Heinesen heiðraður við drúgvari grein eftir Hanne Floor Sørensen. Mangan varð tosað um, at hann skrivaði á donskum og hann var eisini sjálvur frammi í hesum kjakinum.

Greinin, ið er á donskum, tekur m.a. upp málspurningin.

Fleiri aðrar greinar eru í Fróðskaparrit. Tær eru á enskum og eru mest um náttúruvísindi




Úrval av føroyskum troyggjum ÷40%

Natúr tógv 10,- kr.

Merc. bummull 10,- kr.

Vanligt bummull 8,- kr.

Frá hósdegi til leygardag lata vit ÷10% av allari ikki útsøluvøru

Vikuskiftistilboð:

Føroyskt tógv 29,- kr.

TÓGVHANDILIN

Sverrisgøta 19 - 100 Tórshavn

Tlf. 315264